## 12 ár fyri njósning

Ein fyrrverandi embætismaður í verjumálaráðnum í Estlandi varð í gjár dømdur 12 ára fongsul fyri njósning. Maðurin varð funnin sekur í at hava njósnast fyri Russland við at hava latið russum loyniligar NATO-upplýsingar. Tann 61 ára gamli Herman Simm bleiv tikin í september í fjør, eftir at NATO hevði fingið illgruna um, at onkur hevði latið russum loyniligar upplýsingar. Herman Simm arbeiddi í verjumálaráðnum í Estlandi frá 1992 til 2006. Estland fór upp í NATO í 2004.



## Vápnaseljari í fongsul

Ein dómstólur í New York hevur dømt ein sýrialendskan vápnahandilsmann 30 ára fongsul fyri at hava havt ætlanir um at selja uppreistrarmonnunum í Kolumbia vápn fyri nógvar milliónir dollarar. Dómarin vísti á, at tann 63 ára gamli Monzer al-Kassar ætlaði at selja uppreistrarmonnunum vápnini, hóast hann visti, at tey millum annað skuldu brúkast ímóti amerikanarum, sum stríðast við at steðga rúsevnaflutninginum úr Kolumbia. Ein hjálparmaður hansara, sum er ættaður úr Kili, fekk 25 ára fongsul.




lívsfarligt, tí hetta kann gera at trýst kemur á hjártað, sum so ger at hjartað ikki fær pumpað, sum tað skal. Tað vísti seg at vera í allar síðstu løtu, at maðurin kom á Landssjúkrahúsið, og tað stóð veruliga um lív hjá honum tá, sigur Dánjal Petur Højgaard, kommunulækni.

### Skuldsettur fyri grovan harðskap

Sýslumaðurin í Sandoynni, Høgni í Dali, greiðir frá, at hann hevur verið í samband við mannin, sum framdi álopið, og at hann er skuldsettur fyri harðskap av grovum slag.

Eisini hevur hann verið í Skopun, har hann hevur leitað eftir, og funnið, eina jarnstong. Hon er nú send til Danmarkar, har hon verður kannað.

Tað er enn ikki heilt sikkurt, um jarnstongin varð nýtt í bardaganum, men tað verður í øllum førum greitt frá fleiri av pørtunum í málinum, at ein jarnstong varð nýtt.

# Næstan eitt døgn áðrenn løgreglan kom

**Tað skuldi ganga næstan eitt heilt døgn, áðrenn løgreglan á Sandoynni kom til Skopunar at kanna málið um harðskapin. – Vit gera sum frægast, tá vit fáa slík mál, sigur Høgni í Dali, sýslumaður**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*Tað gekk út móti einum samdøgurði áðrenn løgreglan kom til Skopunar at kanna málið við harðskapinum. – Vit fylgdu vanligari mannagongd, og álvarin í málinum kom ikki fram fyrr enn fagin eftir, sigur sýslumaðurin Høgni í Dali*

Høgni í Dali, sýslumaður í Sandoynni, fekk fráboðanina um at harðskapur var framdur umleið klokkan 1 náttina til leygardagin. Hann gevur tá órættaða boð um at fáa fatur at lækna, og síðan at venda aftur til sín, men tað gjørdi hann ikki, tí hann lá á intensivu deild á Landssjúkrahúsinum.

- Eg bað teir venda sær aftur til politistøðina eftir at læknin hevði kannað teir, men eg hoyrdi einki aftur fyrr enn út á dagin leygardagin, og tá kom álvarin veruliga fram í hesum málinum. Tá fór løgreglan í Havn út á Landssjúkrahúsið at avhoyra mannin, sigur Høgni í Dali.

Ikki fyrr enn seint leygarkvøldið, tá teir vistu meira um málið, fór sýslumaðurin til Skopunar at leita eftir jarnstongini, ið órættaði eftir øllum at døma varð sligin við.

*Er tað ikki óheppið, at tá slíkur harðskapur verður framdur, at løgreglan ikki kemur á staðið fyrr enn lítið døgn eftir hendingina, og maðurin, um illa vildi til, longu kundi verið deyður?*

- Tann upprunaliga fráboðanin var bara um harðskap, at menn høvdu verið uppi og keglast og høvdu sligist, og tað var so tað. Vanligt er, at tá tað eru harðskapsmál, og tá eru menn jú oftast fullir, at vit biða teir fara til læknan og fáa tað kannað, og so at venda aftur til politistøðina. Tá veit man presis, hvat er farið fram, og hvussu alvorligt tað er. Men ofta venda teir ongantíð aftur, tá teir hava verið hjá lækna, og eru sissaðir aftur, og eg hugsaði tað sama, tá hetta málið var uppi. Álvarin í hesum málinum kemur ikki heilt fram, fyrr enn órættaði verður avhoyrdur av løgregluni í Havn. Men jú, eg haldi eisini at tað er óheppið, men vit gera sum frægast, tá vit fáa slík mál, sigur Høgni í Dali, sýslumaður.

### Ov lítil tíð til alt

Seinasta hálva árið hava ábreiðslur verið á løgregluna í Sandoynni í tveimum ymiskum greinum í Sosialinum. Fyrru ferð var tá ein smágenta varð illa bitin av einum hundi. Tá høvdu foreldur í grannalagnum, har gentan var og vitjaði, fleiri ferðir kært seg til politiið, men hundurin slapp at ganga leysur og verða til ampa fyri foreldur og børn.

Hitt málið var tá sandoyingar vóru farnir at berjast um eitt feitilendi, og menn skutu seyð hjá hvørjum øðrum, og sum endaði við at tveir mans bardust í haganum.

Í tí málinum spurdi verjin hjá ákærda eisini, hvussu tað kundi bera til, at klandur um eitt feitilendi kundi fara so yvir gevind, at tað endaði í harðskapi. Hann segði, at ein forkláring er, at løgreglan hevði onki gjørt við málið, og at hetta var ein støða, sum kundi verið kvald í føðingini, hevði løgreglan gjørt nakað við málið.

Nú verður aftur hartað eftir løgregluni í samband við harðskapsmálið, men Høgni í Dali, virkandi sýslumaður, vísir ábreiðslunum aftur.

- Eg eri einsamallur um arbeiðið, og eg havi 37 tímar um vikuna. Eg royni sum frægast at tillaga løgregluarbeiðið eftir tímunum, sum eg havi. Tað vísir seg jú sum at alt er pengar, og eg má halda meg til teir tímar, ið eg havi. Kortini verður nógv arbeitt yvir, tí tað er í heilum at eg verði forstýraður, tá eg eigi at hava frí. Tak nú bara hesa vikuna, har havi eg verið til arbeiðis og eri blivin forstýraður hvønn dag, hóast eg eftir ætlan átti at hava frí, greiðir Høgni í Dali frá.

Hann leggur eisini dent á, at hann hevur tveir manns afturat sær, sum hjálpa honum ótrúliga væl, tá á stendur. Men um vanliga gerandisarbeiðið er hann púra einsamallur, og eftir øllum at døma strekkir tíðin ikki altíð til.